# Kongurin av Føroyum

**Blaðmaðurin, sum varð sendur frá Politiken til umrøða Føroyar.dk um vikuskiftið, heldur Høgna Hoydal hava ein rættiligan stjørnustatus í Føroyum, og tað hevur hann ilt við at skilja, tí føroyska samfelagið er so lítið. Føroyskar politikkarar skírir hann fyri at vera bygdasligar**

DANSKIR FJØLMIÐLAR
*Páll Holm Johannesen*

Danskir fjølmiðlar vóru eisini umboðaðir í Norðurlandahúsinum fríggjakvøldið. Blaðmaðurin, Marcus Rubin, ið arbeiðir við mentan á blaðnum Politiken, hevur í blaðnum mánadagin ein drúgva umrøðu av filminum Føroyar.dk. Vit hava loyvt okkum at endurgivið nøkur av hansara sjónarmiðum.

### Høgni og Tony Blair

Eins og í filminum, so fær Høgni Hoydal eisini drúgva umrøðu av blaðmanninum. Yvirskriftin á greinini er »Kongen af Færøerne«, og her verður greitt sipað til støðuna hjá Høgna Hoydal í føroyska samfelagnum.

– Tað er klárt, at Nyrup er stóri skurkurin í filminum, men tað er eisini líka klárt, at Høgni Hoydal er stóra hetjan, heldur Marcus Rubin.

Hann sigur víðari, at frá einum donskum sjónarmiði, so kunnu føroyskir politikkar tykjast heldur bygdasligir.

– Við sínari stóru undirhøku og kronisku skeggstubbum minnir løgmaðurin, Anfinn Kallsberg, ikki sørt um Jeppe på Bjerget. Samráðingarpartnarin, Helena á Neystabø framgongur sum ein provinskona, meðan Høgni Hoydal er eitt ungt »brushoved«, sum tosar bronglut danskt, sigur blaðmaðurin millum annað.

Marcus Rubin er ikki í iva um, at talan er um Høgna Hoydal og so restina av føroyingum. Hann veit ikki rættiliga, hvat tað er yvir honum, men Høgni er føroyska svarið á Tony Blair ella Anders Fogh. Teir hava allir sama stjørnustatus, og somu órørligu og nærmastu reliogiøsu trúgv upp á teirra egnu evnir.

Blaðmaðurin vísir á, at í filminum er Høgni Hoydal høvuðspersónurin. Tað er hann, ið tosar við BBC, og hóast tað er hann, ið tapir samráðingarnar við Danmark, og stríðið við Anfinn Kallsberg, so gevur Ulla Boye honum kortini síðsta orðið. Síðsta viðmerking er av Christiansborg, har Høgni sigur, at stavarin á Christiansborg ikki kennir til orðið »selvstændighed«.



*Við yvirskriftini, Kongen af Færøerne, fær varløgmaður, Høgni Hoydal, toyggi frá blaðmanninum á Politiken, Marcus Rubin, sum hevur fylgt honum í samband við filmin, Føroyar.dk. Myndina hevur Óli P teknað til blaðið 9.mei 1998, og yvirskriftin til myndina var Sólkongurin*

### Stjørnustatus

Marcus Rubin heldur, at Høgni Hoydal fullvæl veit av, at hann er ein stjørna í Føroyum. Hann skjýtur Ullu Boye í skógvarnar fyri, at hon, eftir filmin, takkar Høgna Hoydal, áðrenn løgmanni, tí løgmaður er jú ovasti myndugleiki í Føroyum, og tí kann hennara framførarháttur tykjast løgin.

Hann heldur eisini, tað er rættiliga løgið, at so nógv fólk til eitt hvørt høvi vilja flokkast Høgna, tí føroyska samfelagið er so lítið. Blaðmaðurin sigur beinleiðis, at tað er ófatuligt, at Høgni skal hava slíkan stjørnustatus, tí í einum býi sum Havn við 15.000 fólkum, eiga tey at møta honum dagliga.

- Seinni á kvøldið, tá ballið heldur fram á Hotel Føroyum, heldur mynstrið fram frá Norðurlandahúsinum. Tá Høgni fer í barrina, flokkast fólk honum alt fyri eitt, og tá hann setur seg við eitt borð, eru tær vøkru kvinnurnar skjótar at fáa eitt prát, og tosar Høgni, so verður kvirt í salinum, greiðir Marcus Rubin frá.

Føroyar.dk:

## Ulla Boye ovfarin av móttøkuni

Kvinnan aftanfyri Føroyar.dk, Ulla Boye Rasmussen, var ovfarin av móttøkuni, filmur hennara fekk í heimsfrumframførsluni í Norðurlandahúsinum fríggjakvøldið.

– Eg kendi veruliga á mær, at fólk vóru væl nøgd við filmin. Eg eri ein gomul filmrotta, og tískil veit eg nær fólk meina tað, tey siga, og ikki, og kenslan fríggjadagin var, at fólk vóru sera fegin um filmin, og eri ovfarin av móttøkuni, sigur Ulla Boye Rasmussen.

Hon er sera fegin og lætnað eftir, at frumframførslan er farin afturum. Ulla væntar, at stórt kjak fer at standast av filminum bæði í Danmark og Føroyum. Til frumframførsluna í Norðurlandahúsinum sat Ulla Boye Rasmussen undir liðini á løgmanni og varaløgmanni, og teir báðir høvdu torført við at sita stillir, sum teir hoppaðu, greiðir hon frá.

Hon situr eftir við kensluni, at fólk vóru serliga fegin um tey »lunu« innsløgini, tí tey lýsa væl, hvussu føroyingar eru sum fólk.

Vikuskiftið hevur hektiskt hjá Ullu, og hon er nú afturkomin til Danmarkar, har hon í næstum fer at fyrireika seg frumframførsluna, sum verður í Danmark 26. september.

**-páll**

www.smyril-line.fo

Jákup Mikkelsen flytur við
SMYRIL LINE




SMYRIL LINE



# Hoyr nú skúlaklokkan ringir

**Í ár fara 748 børn í skúla á fyrsta sinni. Vit vitjaðu skúlan á Fossanesi, har 5 børn byrjaðu í fyrsta flokki í gjár**

FYRSTI SKÚLADAGUR
*Rúna Sivertsen*

**Norðoyggjar:** - Árgangirnir eru ógvuliga ójavnir í tali. Tað vil so verða, tá fólkatalið er so lítið, sum í Hvannasunds kommunu, sigur Poul Jacob Zachariassen, skúlaleiðari.

Í 1999 fóru 15 børn í fyrsta flokk á Fossanesi, og tað er nógv í so lítlum skúla. Tað hevndi seg eisini árið eftir, tá bert 2 børn vórðu tilmeldaði skúlan.

Hetta skúlaárið fara 48 børn at ganga í skúla har. Genturnar eru við yvirlutan; tær eru 28 í tali og dreingirnir 20.

Í novembur verða 20 ár, síðani skúlin á Fossanesi varð bygdur.

- Vit hava ikki fastlagt enn, hvussu vit skulu hátíðarhalda dagin, men helst fara vit at hava framsýningar, eitt nú við myndum, tiknar gjøgnum árini, sigur Poul Jacob.

- Longu tá skúlin varð bygdur, var hann ov lítil, og tað er sjálvsagt ikki betur, nú undirvísingarhátturin krevur meiri pláss, sigur skúlaleiðarin.

Tað starvast 5 lærarar við skúlan á Fossanesi. Flokkslærari hjá fyrsta flokki verður Simona Johannesen.




*Hesi fittu børnini fóru í gjár í skúla fyri fyrstu ferð. Frá vinstru: Jóan Petur, Steffan, Rósa, Karla og Maria. Flokkslærari er, Simona Johannensen*

*(Mynd: P.J. Zachariassen)*



*Karla er ein av teimum 748 næmingunum, sum í ár byrja í fyrsta flokki. Hon gongur í skúla á Fossanesi*

*(Mynd: P.J. Zachariassen)*

Sosialurin
– hevur fingið nýtt telefonnummar
tel 34 18 00
fax 34 18 01
heimasíða: www.sosialurin.fo
teldupostur: post@sosialurin.fo

Ókeypis í Det Kongelige Teater!*
Við Maersk Air Bonus skalt tú bert ferðast 3 ferðir úr Vágum, fyri at fáa eitt ókeypis atgongumerki til Det Kongelige Teater í Keypmannahavn
Maersk Air Bonus
Vit geva tær meira
*Serligar reglur eru galdandi. Minnist til Maersk Air Bonuskort, næstu ferð tygum ferðast og samla stig til nógvar áhugaverdar upplivingar, hotelgistingar og flogferðaseðlar.
MAERSK AIR
It's got to be perfect